gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Mortan er nú í B68

**Eftir at hann hevur verið nógv plágaður av skaðum í fleiri ár, roynir fyrrverandi NSÍ maðurin nú fótbóltseydnuna á Svangaskarði**

21 ára gamli Mortan Hansen hevur gjørt av at skifta NSÍ búnan út við tann hjá toftamonnum. Tað eru einar tríggjar vikur síðani, at stóri álopsmaðurin fór at venja á Toftum, og leygardagin hevði Jóannes Jakobsen hann við í hópinum til steypadystin í Klaksvík.

Mortan Hansen skoraði einasta málið, og tað kann væl vera, at hann harvið kom eitt sindur longri fram í røðina, enn hann tóktist vera undan dystinum.

Í fjør vóru brasilumaðurin Marcello og Súni Fríði Johannesen vandamiklasta álopsparið í 1. deild. Súni Fríði var toppskjytti við sekstan málum, og Marcello var næstbestur við fimtan málum.

Leygardagin var Súni Fríði ikki við í Klaksvík, tí hann hevur trupulleikar í lærkrikanum. Marcello var einsamallur á toppinum fyrstu løtuna, men hann noyddist at taka seg úr dystinum við skaða, og so varð Øssur Jacobsen settur inn í einsamallu álopsódnina hjá B68.

Spælið hjá B68 var ikki serliga vinarligt ímóti Øssuri Jacobsen, sum av góðum grundum ikki hevði møguleika at arbeiða við bóltunum, sum ofta løgu í so ovarlaga.

So var tað, at Jóannes Jakobsen gjørdi av, at Mortan Hansen skuldi fáa møguleikan síðsta korterið. Nýggi maðurin vísti, at máltevið er á góðari leið. Fyrst var hann leysur og sendi dygst skeivu megin stólpan, so var hann aftur mest sum leysur men megnaði ikki at royna ímóti málinum, og so var tað, at hann við høvdinum skoraði einasta málið í Klaksvík leygardagin.

### Nógv skaddur

Hóast hetta var fyrsti dysturin hjá Mortani Hansen á besta liðnum hjá B68, so er hann ikki ókendur í 1. deild. Mortan er uppvaksin í NSÍ, har hann eisini hevur spælt í fleiri ár í vaksnamannadeildini. Skaðar hava havt við sær, at hann ikki hevur spælt serliga nógv á besta liðnum. Í fjør var hann við í seks teimum fyrstu umførunum og var so burturi frá inntil tveir teir síðstu dystirnar. Í fjør skoraði hann eitt mál í 1. deild, og í trimum dystum í 2. deild skoraði hann eitt mál.

Eisini í 1999 var Mortan Hansen nógv skaddur. Tá spældi hann við í tveimum dystum heilt tíðliga á árinum og so aftur í trimum teimum síðstu. Úrtøkan var eitt mál í bestu deildini og seks mál í sjey dystum í næstbestu deildini.

Í 1998 gekk hópin frægari. Tá var nýggi B68 maðurin, sum er 21 ára gamal, væl fyri. Hann spældi við í trettan dystum og skoraði fimm mál.

**jh**

# Gott fótbóltslag í Fuglafirði

**ÍF vann sannførandi, og Lakjubrøðurnir í álopinum skoraðu øll málini heima á Sandi**

Fuglfirðingar vita væl, at teirra møguleiki at vinna løgmanssteypið er rættuliga lítil. Men Pauli Jarnskor tykist hava megnað at pota treiskni og viljan at vinna, sum altíð hevur eyðkent gøtumenn, niður í teir.

Eftir tepur tap á heimavølli ímóti B68 og KÍ var ÍF leygardagin á Sandi og spældi ímóti triðja 1. deildarliðnum í bólkinum. ÍF var nógv tað betra liðið. Avrikið og 3–0 sigurin benda á, at longu frammanundan landskappingini er ÍF eitt fínt boð upp á uppflyting. Í 3–4–3 uppstilling hekk tað væl saman, og tá tað eydnast, økist sjálvsálitið, og tað gerst uppaftur betur.

Ikki minst á útivølli er tað av stórum týdningi at hava álopsspælarar, sum megna at halda upp á bóltin og at gera nakað við hann. Soleiðis var tað hjá ÍF á Sandi. Høgni á Lakjuni, Heini Heinason og serliga Bárður á Lakjuni vóru alla tíðina vandamiklir og dusaðu sær í B71 verjuni, sum hevði stórar trupulleikar við at halda tætt.

Kári Reynheim vil hava B71 at spæla við flatari verju. Fleiri føroysk lið hava undanfarin ár brent seg av hesum (men ikki øll) og hava aftur broytt spælskipan. Verjuavrikið hjá B71 leygardagin bendi á, at tað skal ganga skjótt við at innarbeiða fløtu verjuna, um hon ikki skal kosta nógv í landskappingini.

Heldur ikki á álopspartinum var nógv bit í B71. Eli Hentze gjørdi nyttu á sentrala miðvøllinum, men teir saknaðu hann heilt har frammi.

### Málini

Fuglfirðingar vóru ikki heilt nøgdir, tá linjuverjin kolldømdi eitt mál, sum Bárður á Lakjuni skoraði eftir horna. Hjálpardómarin metti, at Torstein Joensen hevði ávirkan á sýnið hjá málverjanum.

Men tá góður hálvur tími var farin, var eingin slingur í valsinum hjá Bárðuri á Lakjuni. Eftir horna, út frá og innlegg frá beiggjanum, Høgna, tamdi Bárður á brotsteigarmarkinum við bringuni, áðrenn hann legði seg afturav og saksisparkaði bóltin upp í málhornið. Eitt evni til ársins mál!

Eitt korter inn í 2. hálvleik var aftur galið hjá B71. Roy Róin fangaði bóltin í B71 uppspæli á teirra egnu hálvu. B71 liðið var á veg fram, Bárður á Lakjuni var skjótt leysur í brotsteiginum, og hóast vinkulin í vinstru síðu var eitt sindur spískur, so megnaði hann at skora við nærra stólpa.

Høgni á Lakjuni staðfesti sigurin. Eyðun Rygshamar legði innfyri úr høgru, og Høgni var lesur í fimm metrinum við nærra stólpan.

**jh**

B71: Valdemar Nowisci – Svenning W. Hansen, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen, Hans Meinhard Midjord – Bjørn Thorsteinsson, Julian Floresco, Eli Hentze, Hans Jørgen Djurhuus – Jón Brekku, Bárður Bærentsen

ÍF: Ken Bærentsen – Viggo Johannesen, Torstein Joensen, Tomek – Eyðun Rygshamar, Eyðolvur R. Petersen, Roy Róin, Mortan Thomsen – Høgni á Lakjuni, Heini Heinason, Bárður á Lakjuni

# B68 fór við øllum

**Klaksvíkingar fingu ikki staðfest leygardagin, hvussu tað fer at hilnast hjá teirra liði í landskappingini**

B68 hevur verið roknað ímillum tey liðini, sum møguligan fara at gera havnarfeløgunum kapping um ovastu plássini í landskappingini. Í Klaksvík hava teir verið ivasamir um, hvussu tað fer at hilnast hjá teirra monnum, eftir at átta ella níggju av spælarunum, sum í fjør vóru við til at manna liðið, eru givnir ella farnir aðra staðni.

Ein av monnunum, sum er farin aðra staðni, er Arnold Joensen. Leygardagin vitjaði hann fyri fyrstu ferð saman við nýggju liðfeløgunum í Klaksvík. Klaksvíkingar tóku væl ímóti Arnoldi, sum spældi í sama plássi, sum hann plagdi at røkja í KÍ.

### Leita framvegis

Á avrikunum sást, at bæði í KÍ og B68 leita teir framvegis eftir rættu uppstillingini, og at tað framvegis er langt eftir, áðrenn spælið hongur so væl saman, sum tað kann gera hjá hesum spælarunum.

Talan var um javna uppgerð, har tað var stríð um nógvar leysar bóltar, bæði í luftini og á jørðini. Toftamenn vóru eitt sindur omaná í fyrra umfarinum, men eftir steðgin vóru klaksvíkingar heilt væl við.

Hjá KÍ var Jan Andreasen uttanfyri við skaða. Símun Waag Høgnesen, sum fyri stuttum er komin aftur úr Esbjerg, har hann hevur vant, var aftastur í verjuni, og Allan Joensen, sum higartil í ár hevur verið á miðvøllinum, var í miðverjuni.

B68 hevði bara Marcello heilt frammi, meðan Øssur Hansen var leysur maður ímillum miðvallararnar og einsamalla álopsmannin. Jan Dam og Hans Fróði Hansen vóru sannførandi í miðverjuni, og John Heri Dam var nýggjur maður á miðvøllinum í vinstru.

### Fleiri møguleikar

Nakrir málmøguleikar vóru báðar vegir. Hjalgrím Elttør hjá KÍ, sum hesa ferð var á miðvøllinum, hevði stutt undan steðginum ein góðan møguleika, og eftir steðgin stútaði Ove Nysted úr blankari støðu mitt fyri omanfyri málið. Í einum føri vóru klaksvíkingar rísnir inn á dómaran, tí hann dømdi fyri frísparki í staðin fyri at geva teimum upplagda fyrimunin av málmøguleika.

Øssur Hansen hevði onkra vandamikla skotroynd ímóti málinum hjá Meinhardi Joensen, og í tí eina førinum var um reppið, at Marcello gjørdist púra leysur, men Allan Joensen rakk akkurát at takla.

Einasta málið skoraði innskifti Mortan Hansen, tá tað bara restaðu tveir minuttir. Messias, sum røkti vongverjan hjá B68 í vinstru, var staddur stutt frammanfyri miðstrikuna, tá hann legði skrátt inn í brotsteigin. KÍ málverjin var á veg út, tá Mortan Hansen við høvdinum snittaði bóltin upp um málverjan og í KÍ málið.

B68 menninir fóru væl nøgdir um Leirvíksfjørð, og klaksvíkingar fóru til hús, uttan at teir høvdu fingið meiri greiðu á, hvussu teirra lið fer at standa seg í ár.

**jh**

KÍ: Meinhard Joensen – Niclas Niclassen, Símun Waag Høgnesen, Allan Joensen – Harley Bertholdsen, Hjalgrím Elttør, Jan Joensen, Fríðin Ziskason – Eyðun Klakstein, Tomislav Sivic, Ove Nysted

B68: Magnus Poulsen – Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Jan Dam, Messias – Arnold Joensen, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, John Heri Dam – Øssur Hansen, Messias

# KÍ fær álopsspælara úr Jugoslavia

**Men teir vilja síggja spælaran vísa, hvør dugur er í honum, áðrenn avgerð verður tikin, um Alexander Djordjevic skal hjálpa klaksvíkingum**

Ein jugoslavi er á veg til Klaksvíkar. Heimasíðan hjá KÍ visti um vikuskiftið at siga, at hann skuldi koma henda vegin í hesi vikuni. Tá vit fregnaðust hjá KÍ formanninum, Svend Jacobsen, í gjár, var hann ikki komin, men tað var ikki óvist, at hann fór at koma seinni í vikuni. Sum øll hini liðini í bólkaspælinum, so skal KÍ spæla dyst skírisdag, páskaaftan og 2. páskadag. Tí verður ikki møguleiki at venja saman við nýggja manninum fyrrenn í komandi viku.

Maðurin eitur Alexander Djordjevic. Sambært KÍ heimasíðuna er hann 32 ára gamal og eitt av eini kendur álopsspælari í Jugoslavia. Hann hevur spælt 350 dystir á besta liðnum hjá Belgrads Partisans, og hetta síðsta kappingarárið hevur hann spælt í oddaliðnum í næstbestu deildini.

Sambært KÍ heimasíðuna var KÍ verjin, Tomislav Sivic, sera bilsin, tá landsmaður hansara ringdi og fregnaðist, um nakar møguleiki var at koma til Klaksvíkar og spæla fótbólt. At Tomislav Sivic er spælari og venjari í Føroyum hevur ofta verið umrøtt í jugoslaviskum fjølmiðlum. Tað man vera soleiðis, at hesin Alexander hevur fingið at vita um Føroyar og KÍ.

### Ikki góðar royndir

Viðhvørt hepnast tað væl, men ofta hevur tað ikki eydnast serliga væl, tá útlendskir spælarar eru komnir henda vegin. Hóast spælararnir hava havt gott hegni, so hevur tað oftast verið neyðugt við eini tillagingartíð hjá spælarunum til føroyskan fótbólt og føroysk viðurskifti.

Hetta vita eingir betur enn klaksvíkingar. Eitt orðatak sigur, at brent barn ræðist eld. Í fjør fekk KÍ ein álopsspælara úr Jugoslavia. Srecko Milicevic var alt annað enn sannførandi. Undan summarfrtíðini spældi hann við í seks dystum. Bara eina ferð var hann við allar 90 minutttirnar, og hann skoraði bara tvey mál. Tað var ikki undur í, at Tomislav Sivic og KÍ leiðslan tóku avgerð um, at jugoslavin ikki skuldi koma aftur til Føroya eftir Europa Cup ferðina hjá KÍ í Jugoslavia.

Nú fáa KÍ og klaksvíkingar høvi at royna, um nýggi maðurin kann brúkast ella ikki.

**jh**

gult27 cyan27 magenta27 svart27



# GÍ hevur trupulleikar við úrtøkuni

**Hóast heimaliðið í Gøtu hevði bóltin nógv meiri, so vóru tað gestirnir úr HB, sum fingu flestu málini**

LØGMANSSTEYP
*Jóannes Hansen*

Gøtumenn høvdu bóltin mesta partin av tíðini, tá teir leygardagin høvdu vitjan av HB. Men tað vóru havnarmenninir, sum fingu trý mál, meðan heimaliðið bara eina ferð megnaði at fáa bóltin í málið aftanfyri ein sera væl spælandi Bárður Johannesen.

Tølini vísa, at ein av trupulleikunum hjá GÍ er, at teir megna ov sjáldan at spæla seg til opnar málmøguleikar. Hóast teir høvdu bóltin nógv, so var tað sjáldan, at teir megnaðu at taga verjuna sundur, tí tað vóru ov fáir at teimum gulu og bláu, sum megnaðu at bjóða av ein ímóti einum.

HB verjan átti at havt verið at tosa við. Hans á Lag er framvegis so mikið skaddur, at hann ikki er førur fyri at spæla. Ion Geolgau tykist halda plássið opið fyri roynda manninum, og hevur nýtt høvið at geva fleiri spælarum møguleikan at royna seg saman við Jóhannisi Joensen.

Hesa ferð var Magnus Jacobsen miðverji í 1. hálvleiki, og í 2. hálvleiki var Jón Rói Jacobsen, sum undan steðginum hevði verið á toppinum saman við Allani Mørkøre, í miðverjuni.

Hjá GÍ kom Henning Jarnskor, sum inntil nú hevur verið í Danmark, á vøllin eftir steðgin. Hann gjørdi ikki so øgvuliga nógv um seg, men eingin ivi man vera um, at tað fer at vera góð nytta í royndu manninum.

Dysturin var eitt sindur ófantaligur. Talan var um nógvar nærdystir, onkrir nærdystir vóru ljótir, og hýrurin millum mótstøðumenninar var ikki góður.

### Málini

HB kom á odda, tá Poul Ennigarð var so óheppin at beina lítið vandamikið horna frá Allani Mørkøre í egið mál. GÍ svaraði aftur við evni til ársins mál. Úr 25 metra fjarstøðu smekkaði vinstri vongspælarin, Pól Henning Jacobsen, til, og bólturin streyk upp í málhornið. Sera vakurt.

Í einum av fleiri skjótum mótálopum legði Rógvi Jacobsen HB framum aftur, eftir at Rúni Nolsøe var farin til baklinjuna og hevði lagt út frá.

Rúni Nolsøe staðfesti HB sigurin, tá átta minuttir vóru eftir. GÍ, sum longu tíggju minuttir eftir hvíldina misti Pól Henning Jacobse, ið fekk gula kortið aðru ferð, hevði trýst leingi, og teir høvdu havt onkrar møguleikar uttan at fáa mál. Rúni spældi eitt tvey við Bjarna Jørgensen, áðrenn hann skoraði. Í 2. hálvleiki vóru Rókur Jespersen og Bjarni Jørgensen í HB álopinum. Teir eru báðir 16 ára gamlir, og tað fer ivaleyst at vera nógv meiri at frætta frá teimum í framtíðini.

HB tykist svimja í fólki. Umframt teir báðar ungu menninar kom eisini veteranurin Rói Árting á vøllin. Hans á Lag, Andrew av Fløtum og Bárður Mortanson vóru skaddir, og so verður tað neyvan leingi, inntil pláss skal fáast til Una Arge í HB álopinum. Tað er stór kapping um plássini í HB.

GÍ: Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Bartal Eliassen, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Sámal Joensen, Áslakur R. Petersen, Magni Jarnskor, Pól Henning Jacobsen – Sedek, Helgi L.Petersen

HB: Bárður Johannesen – Vagnur Mohr Mortensen, Jóhannis Joensen, Magnus Jakobsen, Janus M. Joensen – Ransin Djurhuus, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Hallur Danielsen – Allan Mørkøre, Jón Rói Jacobsen

B36-TB 7-0 (3-0)

## TB fær einki gjørt

**Triðja dystin upp í slag var TB fyri stórtapi í bólkaspælinum**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tað, sum alt fyri eitt varð mett, tykist nú at vera ein sannroynd hjá TB, hóast vit enn bara eru komin hálva leið í bólkaspælinum.

Eftir at hava tapt stórt móti ávíkavist HB og GÍ, skuldu tvøramenn hesa ferð til Havnar, og søgan her var ikki stórt øðrvísi, enn hon hevur verið undanfarnu dystirnar.

B36 vann ein tryggan 7-0 sigur, har merkisverdu fyribrgdini heldur vóru at finna í uppstillingini hjá havnarmonnunum, heldur enn í sigrinum sjálvum. Í málinum førum man tað vera langt síðani, at Jan Guttesen hevur tikið við takkar við at byrja á beinkinum, men saman við eitt nú Bjarna Prior og Heðin á Lakjuni var hetta hansara lutur leygardagin.

Hetta sigur helst eisini nakað um, hvussu sterkur hópurin hjá árstalsfelagnum tykist vera í ár, men samstundis er vert at leggja til merkis, at millum leikararnar á vøllinum taldust onkrir av ungu leikarunum, sum eru uppaldir í felagnum.

### Alt tykist avgjørt

Spurningurin er so, um hetta sigur nakað um, hvussu liðið fer at spæla í ár, ti mest av øllum tykist bólkaspælið at vera eitt tíðarskeið, har sterkaru liðini hava høvi at eksperimentera nakað við liðnum. Enn er bara komið hálva leið, men longu nú tykist í flestu førunum greitt, hvørji liðini verða, sum sleppa víðari úr bólkaspælinum.

Spurningurin er sostatt bara, í hvørjari raðfylgju hesi koma víðari, og eftir tað tykist so at vera ein spurningur, har TB ikki skal hava tað stóra at siga.

### Dysturin í tølum

**B36-TB 7-0 (3-0)**
1-0: Kenneth Jacobsen 4.
2-0: Klæmint Matras 22.
3-0: Jákup á Borg 28.
4-0: John Petersen 58.
5-0: Jákup á Borg 60.
6-0: Heðin á Lakjuni 82.
7-0: Jens Kristian Hansen 83.

# Málleyst í Lyngby

**Fremstu menninir á FCK liðnum høvdu trupulleikar at umseta møguleikarnar til mál og harvið trý stig**

Fleiri enn sjey túsund áskoðarar vóru mánakvøldið í Lyngby og sóu dystin ímóti FCK. Einki mál kom, og harvið varðveittu bæði liðini sína støðu á fjórða og fimta plássinum.

Í 1. hálvleiki var tað heilt sjónskt, at báðir partar løgdu mestu orkuna í at halda tætt. Tað var so at siga spælt við reim og seðlum. Verjurnar vóru øgvuliga væl skipaðar, og tað var bara í hendinga førum, at tað luktaði av málmøguleikum.

Eftir steðgin var ferðin størri. Lyngby hevði bara ein møguleika, sum tryggi FCK málverjin, Thomas Myhre, tók sær av. FCK hevði einar tríggjar møguleikar. Heine Fernadez var púra leysur, tá hann ikki kundi gera av, um hann skuldi royna ímóti málinum, ella um hann skuldi leggja upp á tvørs. Í síðsta minuttinum var Thomas Thorninger í góðari støðu á brotssparks blettinum, men fluktskotið hjá honum rakti á trygga Lyngby málverjan.

Millum áskoðararnar sóust Ståle Solbakken og Todi Jónsson. Einki er at ivast í, at FCK kundi havt fingið størri úrtøku, um teir vóru við. Sibusiso Zuma var av hyggjarunum hjá TV3+ kosin besti maður á vølli. Hann stríddist nógv í álopinum og vísti stórt hegni, men samanspælið við Heine Fernandez gekk ikki væl. Heine er ikki samanspælari, men heldur tað slagið av spælara, sum er sera fokuseraður móti málinum.

Síðstu løtuna avloysti Patrick Simpson Fernandez. Men høgi og myrki sviin tóktist ikki vera serliga væl fyri. Thomas Thorninger var ytstur á miðvøllinum í vinstru. Hann luttók í samanspælinum, men hann megnaði ongantíð at bróta ígjøgnum og leggja innfyri. Tað var bara tá vongverjin, Niclas Jensen, var við, at tað komu innlegg úr vinstra borði. Ivaleyst halda teir í FCK við okkum, tá vit siga, at tað hevur nógv at siga fyri teir, at Todi Jónsson skjótt verður klárur aftur. Tvey pláss standa víðopin og bíða eftir honum!

FCK venjarin, Roy Hodgson, var ikki misnøgdur eftir dystin. Hann helt, at tð ikki var so galið at hava fingið eitt stig á útivølli ímóti einum av hinum oddaliðnum, men hann ásannaði samstundis, at teir í FCK áttu í 2. hálvleiki at havt skorað sigursmálið.

Tað verður spælt aftur í superliguni í morgin. Tá fær FCK vitjan av AaB, Herfølge fær vitjan av Viborg, og OB fær vitjan av Brøndby. Hinir dystirnir eru AGF–AB, FCM–Silkeborg og Lyngby–Haderslev.

Í næstbestu deildini skulu Hvidovre og óli Johannesen spæla á heimavølli ímóti B93, og liðið hjá Atla Gregersen, Randers Freja, fær vitjan av Skive.

**jh**

EB/Streymur-VB 0-4 (0-0)

## Meistararnir hava fult stigatal

**Føroyameistararnir úr Vági tykjast ikki á nakran hátt at taka sær av løttum, nú nýggja kappingarárið er byrjað**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Tað er vandi í hvørjari vælferð, verður sagt, men hetta tykist ikki á nakran hátt at vera galdandi fyri verandi føroyameistararnar í Vági.

Ofta er annars so, at mettan ger seg galdandi, tá eitt lið hevur vunnið nakað, men enn tykjast vágbingar als ikki at taka sær av løttum.

Leygardagin spældu teir triðja dystin í bólkaspælinum, og úrtøkan varð tann sama, sum hon áður hevur verið. Trý stig afturat inn á kontina, soleiðis at VB mest sum hevur tryggjað sær víðari luttøku, hóast vit enn bert eru komin hálva leið í bólkaspælinum.

Gaman í hevur talan í øllum trimum dystunum verið um mótstøðulið, sum verða roknað millum tey veikastu í bestu mansdeildini, men tað er eisini ein dygd at vinna slíkar dystir. Hálvleiksstøðan var 0-0 leygardagin, men við fýra málum seinastu trý korterini settu meistararnir alt upp á pláss. Málini hjá VB skutu Robert Cieslewicz, Krzystof Popczynski, Palli Augustinussen og Jón Gærdboø.

NSÍ-FSV 5-2 (4-1)

# Hat-trick til stjørnuskotið

**Landsliðsmaðurin hjá NSÍ setti sítt stóra merki á dystin móti FS Vágum**

LØGMANSSTEYP
*Jákup Mørk*

Christian Høgni Jacobsen gjørdi rættiliga vart við seg, tá Føroyska landsliðið herfyri leikti undankappingardystir móti Luksemburg og Russlandi.

Fyri mong v ar tað heldur óvæntað, tá hann so brádliga tók av møguleikanum, men leygardagin gav hann aftur eitt dømi um, hví landsliðsvenjarin hevur sýnt honum somikið stórt álit.

Christian Høgni skeyt nevnliga trý av málunum, tá NSÍ sendi FS Vágar vestur aftur við tómum stigaposa, og soleiðis var hann høvuðsmaður í trygga NSÍ sigrinum. Hini bæði málini hjá NSÍ skutu Kári Hansen og Ian Højgaard, meðan Sonni Johannesen og Vladlens Osipovs skutu málini hjá vágamonnum.